gult cyan magenta svart



# Fleiri FM vinnarar eru um at koma undir land

***Kappróður:** Men onkuntíð hevur tað gingið heilt øðrvísi í Kollafirði, enn tað varð roknað við*

Fjórði FM róðurin í hesum kappingarárinum er á skránni seinnapartin í dag. Tað verður kappast á sundalagsstevnuni, sum í ár er í Kollafirði. Um veðurtíðindini eru álítandi, so fara tað eisini hesa ferð at vera góð róðrarlíkindi – akkurát sum tey hava verið góð í teimum trimum kappingunum, sum longu hava verið.

Sundalagsstevnan er í Kollafirði triðja hvørt ár. Tá kappróðurin var í Kollafirði í 1997 stóðst ikki so lítið av øsing og ósemju burturúr. Tá 10–mannaførini róðu vann Havnarbáturin í fyrstu syftu, men tað varð kæt um róðurin, og í umróðrinum var Vestmenningur bestur. Havnarbáturin vann næsta róðurin, sum var á vestanstevnu í Sørvági, men vestmenningar vóru fremstir á ólavsøku og vunnu FM. Í 1998 og í 1999 vann Eysturoyingurin allar róðrarnar, og í ár hevur Nólsoyingurin



*Tað tykist als ikki vera sannlíkt, at nakar megnar at gera nakað við Argjabátin, sum hevur verið einaráðandi higartil í ár. Tað er tó fleiri ferð komið fyri, at favorittarnir hava kiskað, og møguliga hendir okkurt óvæntað í Kollafirði*

vunnið tvær ferðir og Vestmenningurin eina ferð.

Einki er at ivast í, at tað er mest spenningur um 10–mannafararóðurin seinnapartin í dag. Í Vági síðsta leygardag var so at siga eingin munur millum tríggjar teir fremstu bátarnar, og sjálvt um Eysturoyingur endaði á fjórða plássinum, so eigur at verða lagt til merkis, at tað vóru bara tvey sekund frá fremstu bátunum og aftur til FM vinnararnar tey bæði seinastu árini.

Í Vági róðu 10–mannaførini eitt túsund metrar. Á Kollafirði er málið hjá 10–mannaførunum tvey túsund metrar, og tað ger kappingina ikki minni spennandi.

### Áminningin

Í fýra kappingum verður FM kappingin næstan avgjørd, um somu bátarnir vinna í dag, sum hava vunnið higartil í ár. Talan er um um genturnar umborð á Frúnni, kvinnurnar umborð á Jarnbardi, dreingirnar á Tjaldrinum og Argjabátin.

Tað er ilt at fáa eyga á nakra hóttan til hesar bátarnar, men tað er meiri enn so komið fyri áður, at ein manning, sum hevur verið sera sannførandi, hevur kiksað í einum róðri.

1991 er eitt gott dømi um hetta. Tað árið vóru kvinnurnar umborð á Jarnbardi so sannførandi, sum tær hava verið higartil í ár. Tær vunnu FM, men tær snávaðu í einum róðri, og tað var júst á Kollafirði, tá tær vórðu næstfremstar.

Kvinnuróðurin tað árið vann Norðurstovudánjal, sum var úr Sørvági. Vit hava skilt, at tann báturin er ikki til longur. Hann varð keyptur til Esbjerg, og sigst nú vera fyribeindur.

Dreingirnir á Tjaldrinum vóru so sannførandi í 1991, sum teir hava verið higartil í ár. Teir vunnu fimm róðrar og gjørdust meistarar, men teir kiksaðu í einum róðri. Á varmakeldu í Fuglafirði endaðu teir a fjórða plássi.

Munurin millum genturnar umborð á Frúnni og hinar bátarnar er ikki øktur tær seinastu ferðirnar, og seinnapartin í dag fæst at síggja, um Ørnin, Havfrúgvin, Drekin ella Tjaldrið fer at megna at gera nakað við bátin hjá miðvingum.

At nakar skal skala Argjabátin tykist rættuliga óhugsandi.

### Matrikulsstovan hevur mált upp

Eftir róðurin í Vági hava fleiri havt á orði, at tað kennist trupult at fylgja við í kappróðrinum, tá málið – sæð frá har sum áskoðararnir standa og fylgja við – vísir so skeivt. Í hentu kappróðrarskránni, sum RSF undan norðoyarstevnu gav út, er yvirlit yvir allar róðrarteinarnar.

Sambært tí yvirlitinum vísir málið í Kollafirði meiri skeivt hjá teimum, sum standa á havnarlagnum og fylgja við, enn tað ger í Vági.

– Vit hava hoyrt, at tað verður tosað um handa spurningin, men hatta er ikki nakað, sum vit hava so nógv við at gera. Matrikulstovan hevur mált málini upp. Teir eru trygdin hjá okkum fyri, at alt gongur rætt fyri seg hasum viðvíkjandi, og vit síggja onga orsøk til at ivast í teirra arbeiði, sigur Hannis Joensen, formaður í RSF.

Í Vági tóktist vísningurin at vera soleiðis, at norðastu bátarnir, sum vóru næstir áskoðarunum, sóust at vera aftari, enn teir í veruleikanum vóru. Í Kollafirði er málið mált soleiðis upp, at hjá teimum, sum fara at fylgja við á havnarlagnum, fer tað at tykjast sum at norðastu bátarnir verða fremri, enn teir í veruleikanum fara at vera.

Hannis Joensen vísir á ein trupulleika, ið bátarnir, sum liggja norðast á Kollafirði aftur og aftur hava givið sær sjálvum:

– Royndirnar siga okkum, at bátarnir stýra ov nogv í bakborð, tá teir rógva ði Kollafirði. Tað tykist sum um teir eru so fokuseraðir upp á at koma inn undir havnarlagið. Málið er mitt úti á fjørðinum, tá tað verður róð eitt túsund og 1500 metrar. Tá 10–mannaførini rógva, er startmálið undir syðra landinum.. Um bátarnir stýrra í bakborð í staðin fyri at halda seg til sín geira, so rógva teir ein longri tein, enn tann, sum teir skulu rógva, minnir Hannis Joensen á.

JH

## Mundu mist finaludystin

*Fimm ungir føroyingar vóru hepnir, tá teir varnaðust, at innbrot hevði verið í bili teirra*



*Tórálvur Poulsen var ein teirra, sum var um reppið at missa atgongumerkini til EM-finaluna*

Jákup Mørk

Millum mongu áskoðararnar, sum í hesum døgum eru í Belgia og Hollandi og hyggja at EM, eru sjálvsagt eisini nakrir føroyingar.

Ein teirra er nólsoyingurin, Tórálvur Poulsen, sum er í ferðalagi við fýra havnarmonnum, Áka Joensen, Búa Dam, Boga Øster og Ragnar Rasmussen.

Mikukvøldið vóru teir staddir á King Baduin Stadion í Bruxelles, har hálvfinalan millum Frakland og Portugal var á skránni, og einki er at taka seg aftur í, at talan varð um eina stóra uppliving hjá teimum fimm.

- Tað kann als ikki greiðast frá, hvussu stór upplivingin er. Stemningurin runt vøllin var ótrúligur, og tá talan samstundis er um nakrar av heimsins bestu leikarum, so er alt bara í topp, sigur Tórálvur. Áður hevur hann annars verið til dyst millum Arsenal og Liverpool, men hetta er fyri einki at rokna afturímóti sigur hann.

Tá vit hóskvøldið tosaðu við Tórálv, vóru teir júst á veg til fronsku venjingarleguna, sum lá skamt frá bústaði teirra, og vónaðu teir sjálvsagt at hitta onkran av fronsku heimsmeistarunum. Í morgin gongur so leiðin til Rotterdam, har teir við egnum eygum kunnu síggja, um tað nú eisini eydnast Fraklandi at vinna finaludystin.

### Friðarligt

Ein kundi kanska verið bangin fyri, at talan fór at gerast um rok, tá eysturríski dómarin móti endanum av dystinum bríksladi fyri brotssparkið til Frakland. Rok varð, men bert á vøllinumm, greiður Tórálvur frá.

- Einar tíggju minuttir eftir dystin var leikvøllurin longu manntómur, og um kvøldið var so at siga einki rokn, sigur hann. - Einasta, sum sást ella hoyrdist nakað til, vórðu nakrir glaðir fraklendingar, sum fegnaðust um, at tað var eydnast teimum at koma í finaluna.

### Mundu mist finaluna

Teir fimm vóru nevnliga fyri eini skelkandi hending mikukvøldið, sum teir tó koritni kundu flenna eitt sindur at hóskvøldið.

Eftir at hava sæð hálvfinaluna, gjørdu teir av at fara á eina café, har teir so vórðu sitandi í einar tveir tímar.

Afturkomnir til bilin sóu teir, at onkur hevði brotið rútin í bilinum. Stereoannleggið varð stolið, eins og ein ryggsekkur, og hetta var sjálvandi at harmast um, men týdningarmestu lutirnir í bilinum vóru tó eftir.

Hevði tjóvurin nýtt eyguni eitt lítið sindur betri, hevði hann sæð, at fimm atgongumerki til finaludystin í Rotterdam eisini vóru í bilinum. Einki er at taka seg aftur í, at virði á hesum hevði verið nakað væl størri enn virði á tónleikabúnaðinum, um hesi vórðu seld uttan fyri stadion á dystardegnum. Vanliga verða líknandi atgongumerki seld fyri einar 20.000 kr. fyri hvørt, tá svarti marknaðurin er í fullum blóma.

Nú høvdu teir so fingið okkurt rútaskapilsi sett í bilin, og í morgin halda teir so leiðina til Rotterdam, og ivaleyst verður ansað væl eftir, at eingin ókunnumaður fær hendur á atgongumerkjunum.



# Finaluluttakararnir funnir

*Talan verður undir øllum umstøðum um eina søguliga finalu sunnudagin, men skal søgan fylgjast, er eingin ivi um, at tað verða fraklendingar, sum fáa gullmerkini hongd um hálsin. Higartil hava í øllum førum veri nógvar endurtøkur í mun til EM-endaspælið í 1984*



*Toldo bjargar her fyrra brotssparkið í dystinum. Holland tapti, tí teir bert fingu mál upp á 1 av seks brotsspørkum*

Jákup Mørk

Spurningur: Hvat hava Føroyar og Holland til felags? Svar: Hvørgin dugur at gera nýtslu av brotsspørkum!

Freistandi er at seta omanfyristandandi samanbering, eftir at Holland hóskvøldið mátti lúta fyri Italu eftir 120 harðar minuttir og eftirfylgjandi brotssparkskapping.

### Vunnu og taptu

Spátt varð undan dystinum, at avgerandi fyri dystin varð, hvussu italska verjan fór at standa seg móti hollendska álopinum. Á ein hátt kann sigast, at hendan dystin vann hollendska álopið, men teir megnaðu bara ikki at gera arbeiðið liðugt. Tvær ferðir vórðu italumenn nevnliga noyddir at nýta ólóglig vápn í brotsteiginum, og báðu ferðirnar varð hetta sektað við brotssparki, men fyrru ferðina vardi Toldo fyri skotinum hjá Frank de Boer, meðan Patrick Kluivert skeyt á stongina seinnu ferð.

Í so máta høvdu hollendingar allar møguleikar at avgera dystin, og harumframt spældu teir í nærum 90 minuttir við einum manni í yvirtali, eftir at Zambrotta varð rikin av vølli í 33. minutti.

Høvdu italiumenn verið verjukendir undan útvísingini, so vóru teir tað ikki minni eftir hetta. Fyrstu 90 minuttirnir vóru eitt langt hollendskt álop, meðan italiumenn bert høvdu eitt skot umframt eina frísparksroynd móti málinum hjá heimaliðnum.

### Stríddust

So at siga allan fyrra hálvleik tóktist greitt, at tað fyrr ella seinni skuldi eydnast hollendingum at skora, men málið kom bara ongantíð. Sum dysturin fráleið, gjørdist tó alt meira spennandi. Italska verjan fekk nógv betri fatur á, tá seinni hálvleikur byrjaði, og eftir at Delvecchio kom á vøllin fyri Inzaghi, vóru brádliga eisini nøkur italsk mótálop at síggja.

Einki av hesum gav tó úrslit, og tá heimaliðið heldur ikki megnaði at skora, mátti úrslitið gerast brotssparkskapping. Søguligt fyri hesa var, at hvørgin parturin nakrantíð áður hevði vunnið eina brotssparkskapping. Holland hevði roynt hetta tríggjar ferðir, meðan Italia hevði sagt farvæl á henda hátt fýra ferðir.

Í brotssparkskappingini helt ónda ringrásin hjá Hollandi fram. Tey bæði fyrstu brotsspørkini vórðu misnýtt, og tá Totti, eins og Panenka gjørdi tað í 1976, lobbaði sítt brotsspark í málið, var líkt til, at Holland var úti. Van der Saar bjargaði tó næsta skotinum frá Maldini, men Toldo gjørdi honum kynstrið eftir, tá Bosveit skeyt, og so var leyst og liðugt.

Fegnir tustu italsku leikararnir yvir móti størstu hetju teirra, Toldo, meðan hollendingarnir vónbrotnir máttu ásanna, at teir ikki høvdu gjørt sær dælt av sínum møguleikum.

Onkur vildi kanska sagt, at fótbólturin við hesum tapti, og kanska er hetta eisini rætt. Í øllum førum tá tosað verður um álopsfótbóltinum, sum Holland stendur fyri. Vælkendi verjufótbólturin hjá Italia vann, og hóast talan ikki er um undirhald á sama støði støði, so er tó eisini talan um fótbólt um fótbólt.

At enda kann viðmerkjast, at tá Noreg í seinastu minuttunum av bólkaspælinum mátti siga farvæl til EM-endaspælið, skrivaði ein blaðmaður í danska Tipsblaðnum, at slík kvøld trýr man uppá, at ein fótbóltsgudur veruliga er til. Nú skal eg ikki siga, um hetta er rætt ella skeivt, men um so er, kann ein allarhelst staðfesta, at talan er um ein italiumann!



*Frøin var sjálvsagt ovurstór, tá tað varð greitt, at Italia hevði vunnið seg fram til finaludystin*

### Franska vónin livir

Tá fraklendingar komu til EM-endaspælið, var tað við einum dreymi um, at teir skuldu gerast fyrsta landið, sum megnaði at verða bæði heims- og europameistari í senn, og henda vón livir framvegis.

Mikukvøldið leiktu teir móti Portugal, sum má sigast at hava verið positiva yvirraskilsi i endaspælinum. Talan var um eina endurtøku av hálvfinaluni frá 1984, og umframt at mótstøðuliðini vóru tey somu, so vóru eisini fleiri aðrir samanfallandi lutir í dystinum.

### Mangt er løgið

Ta ferðina varð talan eisini um franskan eitt máls sigur, 3-2, og eins og mikukvøldið, varð talan um 1-1 eftir fyrstu 90 minuttirnar.

Sigursmálið í 1984 varð skotið av Platini, sum á rygginum bar 10-talið, og sigursmálið mikukvøldið varð skotið av Zidane, sum á rygginum hevur prentað nr. 10.

Annars kann til stuttleikar nevnast, at í 1984 var fyrsti dysturin hjá fraklendingum móti Danmark, og í ár varð fyrsti dysturin móti, ja gita – Danmark.

Tað stendur eisini staðfest, at Frakland tað ferðina gjørdist europameistari, eftir at Týskland hevði átt heiðurin í fýra ár. Sum er, hava týskararnir, sum eisini vóru eitt vónbrot í 1984, verið europameistarar í fýra ár, men um Frakland ger søguna fullgjørda fæst ikki at vita fyrr enn sunnudagin.

At enda kann nevnast, at Týskland í 1980 vann EM, eftir at kekkia púra óvæntað hevði vunnið kappingina fýra ár frammanundan eftir sigur á Týsklandi, og í 1996 vann Týskland EM, eftir at Danmark fullkomuliga óvæntað hevði vunnið heitið fýra ár frammanundan – við finalusigri á Týsklandi. Og fyri at tað ikki skal vera lygn, so vunnu bæði Kekkia í 1976 og Danmark í 1992 seg fram til finaluna, við at basa Hollandi í hálvfinaluni.

Heilt eins vóru vegirnir hjá Dønum og kekkum tó ikki, tí meðan Kekkia vann við tveimum málum á Hollandi og við brotsspørkum á Týsklandi, so vann Danmark brotssparkskapping móti Hollendingum, fyri síðani at vinna á Týsklandi við tveimum málum.

### Frálík hálvfinala

Um dystin millum Frakland og Portugal hesu ferð er annars at siga, at talan var um eitt fótbóltsupplivilsi av teimum heilt stóru.

Frammanunand var nógv skrivað um, at hetta var ein dystur millum Zidane og Figo, men teir báðir vóru so avgjørt ikki einastu fótbóltsúrmælingarnir á vøllinum.

Snøgt sagt var talan um dyst, sum hevði alt. Høga leikferð, hugflogsríkt álopsspæl og spenning so tað forslær. Portugisar løgdu seg á odda við einum máli, sum Gomes skeyt, men Henry javnaði fyri heimsmeistararnar.

90 minuttir gingu, uttan at nøkur avgerð fall, og líkt varð til, at dysturin skuldi avgerast við brotsspørkum, og tað varð hann kanska á ein hátt.

Longda leiktíðin var nevnliga um at vera liðug, tá Xavier nýtti hondina, í eini desperatari roynd at verja fyri einum skoti frá Wiltord. Dómarin varnaðist einki, men linjuverjin hevði sæð hendingina, og sostatt endaði alt við, at dómarin bríksladi fyri brotssparki.

Portugisar mótmæltu bæði væl og leingi, men einki fekk dómaran at broyta avgerðina, og tá Zidane so endiliga slapp at skjóta, var hann ósvikaliga tryggur.

Ein brotssparksdómur er altíð ein keðiligur endi á einum slíkum dysti, men í hesum førinum kundi tað tó ikki verið øðrvísi. Tað hevði tó verið munandi stuttligari, um dysturin varð avgjørdur einar tveir minuttir undan hesum. Tá hevði Zidane fintað einar fýra mótstøðumenn, men tá seinasta avleveringin skuldi gerast, fekk portugisiska verjan kortini fatur á bóltinum.

### Søgulig finala

Sostatt verður talan um ein finaludyst millum Frakland og Italia, og bæði fara helst at gera sítt til at skriva ein



*Portugisar vóru alt annað enn nøgdur um brotssparkið, sum Frakland fekk í fyrru hálvfinaluni*

part av fótbóltssøgu.

Italia hevur ikki vunnið nakað heitið, síðani teir í 1982 vunnu HM, og tá italiumenn sjálvir halda seg vera eitt sjálvsagt stórveldi innan fótbóltin. Harafturat hevur italski venjarin, Dino Zoff, møguleikan at gerast fyrsti maður, sum hevur verið europameistari bæði sum leikari og venjari. Zoff vardi nevnliga italska málið, tá Italia í 1968 vann EM.

Frakland kann tó eisini skriva søgu, um teir vinna. Teir gerast tá fyrsta land, sum samstundis kann kalla seg heims- og europameistara.

Sostatt verður undir øllum umstøðum søguskriving sunnukvøldið, men hvat lið verður meistari, er ilt at siga. Fraklendingar hava sýnt betra spælið higartil, og teir mugu helst metast sum favorittar at vinna dystin.

Hinvegin hevur Italia verið sera sterkt, og hóast teir kanska ikki hava sýnt so vakurt spæl, so hava teir í øllum førum eina sterka verju, og tað er í øllum førum ein góð fortreyt at hava.

Undir øllum umstøðúm er líkt til, at talan verður um eina sera spennandi finalu, tá skíggin verður tendraður sunnukvøldið.

## Tvey farvæl

*Eftir taptu hálvfinalurnar søgdu bæði hollendski og portugisiski venjarin farvæl*

Jákup Mørk

Teir báðir venjararnir hjá Portugal og Hollandi, hava báðir lagt frá sær, nú tað ikki eydnaðist landi teirra at vinna seg frram til finauldystin í EM-endaspælinum.

### Óvæntað

Hósdagin kom tað sum ein skelkur, tá væl lýddi portugisin, Humberto Cuelhos, legði frá sær.

Síðani hann tók við róðrinum hjá artugal, hevur tjóðin ment seg frá at hava nakrar evnaríkar leikarar, sum kortini ikki eru nóg góðir tá á stendur, til at verða eitt lið, sum roknast kann við í altjóða kappingum.

Sum leikari hevði Cuelhos eina glæsiliga yvrkisleið, har hann við felagið sínum, Benfica, vann portugisiska meistaraheitið fleiri ferð.

### Farvæl til ein legenda

Hevði Cuelhos eina glæsiliga yrkisleiðsum leikari, so var hon tað ikki minni hjá Hollendska Frank Rijkaard.

Sum leikari var hann við til at vinna alt tað, sum ein leikari kann hugsa sær, við undantaki av sjálvum heimsmeistaraheitinum.

Eftir taptu hálvfinaluna móti Italia segði Rijkaard, at hann hevði bert eittans mál, at gerast europameistari, og nú hetta ikki gekk, helt hann tað vera tíð til, at aðrar kreftir kunnu sleppa at royna seg.

Hóast Holland hevur staðið seg væl í endaspælinum, so hevur Rijkaard ikki altið verið væl viðfarin í bløðunum. Holland spæli illa í nógvum venjingardystum, og ikki fyrr enn eftir 6-1 sigurin á Jugoslavia, fekk hann veruligan stuðul frá fólkinum.

gult cyan magenta svart